## Missir OL-gullmerki

Rashid Ramzi, sum upprunaliga er úr Marokko, men umboðar Bahrain í frælsum ítrótti, hevur mist gullmerki í 1.500 metra renning, sum hann vann á olympisku leikunum í Peking í fjørsummar, orsakað av einari positivari dopingroynd. Hann er ein av fimm íðkarum, sum eru tiknir fyri at brúka Cera, eftir at dopingroyndirnar frá Peking eru kannaðar av nýggjum. Hini eru David Rebellin úr Italia, Stefan Schumacher úr Týsklandi, Vanja Perisic úr Kroatia og Athanasia Tsoumeleka úr Grikkalandi.




## Button til McLaren

Enski heimsmeistarin í Formel 1-kappkoyring, Jenson Button, verður komandi kappingarár liðfelagi við landsmannin, Lewis Hamilton, sum var heimsmeistari í fjør. Button, sum vann meistaraheitið við felagnum Brawn GP, skiftir nú til McLaren. Fyri einum ári síðani tosaðu fleiri um, at hann var liðugur sum Formel 1-kappkoyrari, men nú hevur hann fingið ein sáttmála, ið gevur honum ein tungan lønarposa í fleiri ár.

# Nullið nógv at siga

**– At vit vunnu, var sjálvandi altavgerandi, men fyri okkum hevði tað eisini nógv at siga, at vit megnaðu at halda nullið, sigur annar av U21-landsliðsvenjarunum, Bill McLeod Jacobsen**




**Hilmar Jan Hansen**

Tað var ein ovurfegin venjari, vit høvdu í telefonini eftir dystin í Riga í gjár, tá U21-landsliðið enn eina ferð hevði gjørt tað, eingin hevði roknað við og væntað: Vunnið 1-0 á Lettlandi – enntá á útivølli!

– Vit vistu, at hetta fór at verða ein torførur dystur. Men okkara menn vístu góðan vilja og gott spæl. Sæð yvir allan dystin var spælbýtið helst 50-50, men vit høvdu alla tíðina fult tamarhald á, og har var ongantíð nakar panikkur, sigur Bill McLeod Jacobsen.

– At vit vunnu, var sjálvandi altavgerandi, men fyri okkum hevði tað eisini nógv at siga, at vit megnaðu at halda nullið. Tað eydnaðist, tí vit høvdu eina sterka bakkketu, ið taldi rættiliga nógvar sentimetrar í hædd. Hartil høvdu vit eisini ein sera góðan miðvøll og eitt sera hartarbeiðandi álop.

Bill sigur, at sum dystinum leið, valdu teir at broyta spælið, so meira fekst burturúr, at lettar ikki vóru so næskir, sum teir høvdu verið fyrra dystin.

– Vit løgdu trýst á teir langt frammi á vøllinum, og sum tíðin gekk, peikaði alsamt meira á, at tað skuldi ganga okkara veg. Lettarnir høvdu kanska fleiri málroyndir enn vit, men okkara vóru væl vandamiklari, so talan gjørdist um ein fult uppibornan sigur, sigur venjarin.

### Andorra á skránni

Tíðliga í morgun byrjaði so fráferðin úr Riga, sum í fyrsta umfari gongur til Keypmannahavn. Seinnapartin verður so flogið til Barcelona, haðani koyrt verður í bussi í tríggjar tímar, áðrenn ferðalagið seint í kvøld er komið upp á pláss í Andorra.

– Hesin dagurin verður møðsamur hjá okkum øllum, tí so nógv ferðing er á skránni. Men vit hava so fríggjadagin til nakrar fyrireikingar og onkra venjing áðrenn dystin leygardagin, sigur Bill, ið ikki vil undirmeta mótstøðuliðið, hóast tað er væl og virðiliga aftast í okkara EM-bólki.

– Teirra U21-landslið er nýtt og hevur ikki tær stóru royndirnar, og í hesi kappingini hava teir hvørki fingið mál ella stig. Vit hava so ein trumf í Boga Løkin, ið vónandi verður klárur leygardagin, eftir at hann nú sat uttanfyri, tí hann hevur verið skaddur í knænum. Men eisini hava vit aðrar frískar menn at seta inn, um vit halda okkum hava brúk fyri tí.



**Bill McLeod og Heðin Askham, ið saman hava ábyrgdina av U21-landsliðnum, eygleiða upphitingina undan dystinum ímóti Lettlandi í gjár** Mynd: Fótbóltssambandið

# Alt stríðið vert

**– At spæla aftur á U21-landsliðnum var sera stuttligt, men bara upp á ein annan máta, enn at spæla á A-landsliðnum.**



Jóhan Troest Davidsen, sum her gongur undan í upphitingini í Riga í gjár, var fyrstu ferð aftur á U21-landsliðnum, síðani hann í 2007 var tikin upp á A-landsliðið, har tað higartil er blivið til 14 dystir Mynd: Fótbóltssambandið

**Og so var tað heilt ótrúliga stuttligt at vinna, sigur Jóhan Troest Davidsen, ið legði upp til sigursmálið**

Tað eru liðini tvey ár, síðani Jóhan Troest Davidsen spældi sín fyrsta A-landsdyst, sum var á útivølli ímóti Ukraina tann 17. oktober í 2007. Síðani eru dystirnir blivnir 14 í tali, men undan tí var hann ein av berandi kreftunum á U21-landsliðnum, og í gjár, tá Føroyar vunnu 1-0 á Lettlandi, var hann aftur á liðnum, hann ikki hevur spælt við hesi bæði farnu árini.

– At hava verið á A-landsliðnum hevur verið ótrúliga stuttligt, og tað var tað sjálvandi eisini, nú eg aftur var á U21-landsliðnum. Tað er bara stuttligt upp á ein annan máta, tí eg haldi, at vit vóru meira við, enn vit eru vanir við tað á A-landsliðnum. Og so var tað eisini heilt ótrúliga stuttligt at vinna henda dystin, sigur Jóhan, ið helt sigurin vera fult uppibornan.

– Eg haldi, at vit vóru líka góðir sum lettarnir, men annars skifti trýstið allan dystin, so tað viðhvørt vóru teir og viðhvørt vit, sum trýstu. Teir brúktu nógvar langar sendingar, tí vøllurin var so vánaligur, men vit í verjuni fingu ikki trupulleikar av tí. Har eru jú nógvir stórir menn, og eg var enntá nógv tann minsti av okkum fýra í aftastu ketuni.

### Gott sjálvsálit

Jóhan Troest Davidsen heldur, at sigurin í Riga veruliga hevur gjørt, at tað hevði verið tað vert at vant í langa tíð, nú allir aðrir fótbóltsspælarar langt síðani hava lagt gaggurnar á hillina fyri veturin. – Bara tað, at vit so vunnu, gjørdi sítt til, at eg siti við kensluni av, at tað veruliga hevur verið tað vert, sigur Jóhan, sum í gjár legði upp til sigursmálið, tá hann sendi innfyri til Jóan Símun Edmundsson, ið skoraði við einum góðum skallara.

Leygardagin bíðar so næsta avbjóðingin, og tá er tað Andorra, sum er á skránni. Talan er um eitt mótstøðulið, ið á ongan hátt kann sammetast við Lettland, men fyri tað heldur verjuspælarin, ið hesa ferð var á høgra bakki, at farast má inn á vøllin við rætta hugburðinum:

– Nú hava vit akkurát vunnið, so sjálvandi hava vit gott sjálvsálit. Eg kenni lítið og einki til Andorra, annað enn, at teir ikki hava staðið seg so væl, men hetta átti at verið ein dystur, har vit hava møguleika at vinna. Tað er tó sera umráðandi fyri okkum, at vit fara inn á vøllin upp á sama máta, sum vit gjørdu tað ímóti Lettlandi, sigur Johan Troest Davidsen.

hil